# – Eg havi fingið eitt nýtt lív



## – Nú síggi eg ikki longur stjørnur fyri mær, tá ið eg bukki meg niður, sigur Willy Stampe, sum seinastu mánaðirnar hevur tveitt sløk 70 pund av sær

Persónssøga



Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Langar nætur við videofilmum, junkfood, sjokulátu og sodavatni eru farnar í søguna. Nú skal sovast um náttina og etast regluliga og sunt um dagin.

Willy Stampe úr Klaksvík er ein nýggjur maður, eftir at hann seinasta hálva árið hevur tveitt sløk 70 pund av sær.

– Tá eg fór upp á vektina í fjørsummar og sá, at eg vigaði 132 kilo, var tað blivið ov nógv av tí góða. Tá segði eg við meg sjálvan, at nú mátti eg taka meg saman, sigur hann.

Síðani eru kost- og lívsvanarnir nógv broyttir, og Willy er minkaður so nógv, at fólk fyrstu tíðina høvdu ilt við at kenna hann aftur á gøtuni.

– Avgerðin um at tapa meg, er tann besta avgerðin, sum eg havi tikið í lívinum, sigur hann.

### Snorkaði sum ein motorsúkkla

Tað var í august mánaði í fjør, at Willy Stampe fór í kríggj við síni mongu kilo.

– Eg hevði gingið og hugsað um tað í eina tíð. Hevði mest sum gjørt upp við meg sjálvan, at nú skuldi eg gera okkurt við vektina hjá mær. Tað var blivin ein stórur persónligur trupulleiki fyri meg, at eg vigaði so nógv. Eg orkaði simpelten ikki at fylgja við í gerandisdegnum.

- Eg fór til arbeiðis um morgunin, og í døgurðatímanum plagdi eg at sova. Eg plagdi eisini at fáa mær ein lúr beint aftan á arbeiðstíð, tí eg var altíð so troyttur.

– Um náttina svav eg ov lítið, tí eg var ofta uppi væl út á náttina og hugdi eftir videofilmum, og aftur við filmunum skuldi eg so eta og drekka okkurt – junkfood, bomm, sjokulátu og sodavatn. Tá eg so svav, snorkaði eg so illa, at tað ljóðaði sum ein Harley Davidson.

– Mær hevur eisini altíð dámt væl at spæla fótbólt, men tað hevur verið rættiliga avmarkað, hvat eg havi kunnað gjørt, tí eg havi verið so tungur.

### Eingin skuldi vita um Ebeltoft

Hóast viljin til at tapa seg rættiliga var farin at menna seg, so var tað eingin løtt avgerð at taka.

– Eg ivaðist eitt sindur, tí eg visti, at tað var ein sera stór avbjóðing fyri meg, og eg var ikki vísur í, at eg fór at klára tað. Eg tordi næstan ikki at gera eina roynd, greiðir Willy frá.

Men ein sunnumorgun í august fall endaliga avgerðin, og Willy fór til Danmarkar sama dag.

– Tað vóru bara nøkur heilt fá av mínum nærmastu, sum vistu hví eg fór til Danmarkar. Eg ætlaði ikki, at nakar skuldi vita, at eg hevði verið í Ebeltoft, fyrr enn eg kom aftur á jólum. So eg segði